## Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI · TEKNISKI SKÚLIN

# Projektleiðaraútbúgving

Útbúgvingin varar 6 dagar í tíðarskeiðnum frá 24. november 2003 til 13. januar 2004.
**Kunningarfundur verður týsdagin 11. nov. 2003 kl. 16.00 á Føroya Handilsskúla**

**Málbólkur**
Útbúgvingin er fyri núverandi og komandi projektleiðarar, sum ikki hava eina teoretiska útbúgving, men hava tørv á grundleggjandi fyritreytum og amboðum innan projektleiðslu og -stýring.

**Innihald**
- Hvat er góð projektleiðsla og hvussu verði eg ein góður projektleiðari?
- Projektleiðara-leikluturin frá byrjan til enda
- Hvussu velji eg tað rætta stýringsleistin?
- Amboð hjá einum projektleiðara
- Fellur í teimum ymisku projektstigunum og hvussu ein sleppur undan hesum
- Gerð av projektætlan við virksemisyvirliti, tilfeingisyvirliti og tíðarætlan
- Hvussu tú skapar motivatión og áhuga, tá ið tú skalt byrja eitt projekt, og hvussu tú samansetur og mennir ein projektbólk

Høvuðsendamálið við útbúgvingini er at læra, hvat góð projektleiðsla er og venja seg í at vera góður til tað.

Skift verður ímillum modul, sum vara 2 dagar, og heimauppgávur við støði í tínum projektum, sum samantvinna teori og praktiskt arbeiði.

**Modul 1:** Neyv lýsing av projektætlanini, projektavmarking, áseting av endamálinum, vanlig stig í einum projekti, áhuga - og tilfeingisgreining, samanseting av tí best hóskandi verkskipanini, byrjan av projekti og ígongdsetan av projektbólki.

**Modul 2:** Tíðar og virksemisætlan herundir KT-amboð, kritiski vegur/virksemi hjá projektinum, vandagreining og meting av projekttíð og búskapi, virkisætlan, projektfrágreiðing.

**Modul 3:** Leikluturin hjá projektleiðaranum og leiðarauppgávur, bólkamenning, ósemjur og handfaring av hesum, uppgerð av projektinum og eftirmetingar.

Meira um útbúgvingina er á: **www. skeidsdepilin.fo.** Har kanst tú eisini tekna teg.

**Tíð:** 48 tímar
**Dagar:** 24. og 25. nov. 2003
15. og 16. des. 2003
12. og 13. jan. 2004 (allar dagar kl. 08.30-16.00)

**Skeiðleiðari:** Georg Suðurgarð
**Kostnaður:** kr. 7.200,- (íroknað frálæru, tilfar og mat)

**Tilmelding:** **Í seinasta lagi 13. november 2003.**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
Tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo






Stór útsøla av klæðum til børn, kvinnur og menn, byrjar fríggjamorgunin
31. oktober 2003 kl. 10.00
á 2. hædd í Niels Finsensgøtu 20

Norðfasion



**DVEYLAN**
**Gólv- og vegg vask**



- Vinyl
- Linolium
- Flísar
- Teppir
- Veggir

J.C. Svabosgøta 50
100 Tórshavn
Tlf. 31 41 75


# Kunngerð

**frá útskiftingarnevndini fyri Gjáar bygd**

Á fundi 22. oktober 2003 hevur útskiftingarnevndin gjørt úrskurð um býti av haganum Dalur og Fløtur.

Eftir kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939 kunnu útskiftingin og úrskurðurin hjá útskiftingarnevndini kærast til yvirútskiftingarnevndina, og er kærufreistin 3 mánaðir frá 31. oktober at rokna. Kærufreistin er úti 31. januar 2004.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Sorinskrivaran, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn, ið er formaður í yvirútskiftingarnevndini.

Útskrift av úrskurðinum liggur frammi á Matrikulstovuni í Tórshavn til kærufreistin er úti.

*N. v.*
**Bjarni Hansen**
**útsk. form.**

# Frá Sandoyar Kvøldskúla

Treytað av nóg stórari undirtøku og myndugleikanna góðkenning verður skipað fyri telduskeiði:
1) Tekstviðgerð (Word)
2) Rokniark (Excel)
3) Presentationsamboð (Power Point)

Tilmelding hjá Dánjali Olsen, Skopun, tlf. 361776 í seinasta lagi fríggjadagin 7. november.

**Sandoyar Kvøldskúli**

# Frá C.I.S.V.
# Altjóða Barnalegum

Aðalfundur felagsins verður í Kommuneskúlanum leygardagin 15. november kl. 14.00.

**Nevndin**

# Nesi hagi

verður seldur til haruskjóting fríggjadagin 31. oktober kl. 19.00 í seyðahúsinum hjá Jógvan E. Davidsen, Æðuvík.

**Hagastýrið**



# Citroën Berlingo 2.0 HDi (Diesel)



Árg. 04/2001 koyrt 28.000 km.
Biluri, ið er sera væl viðfarin, hevur 15" alu felgur, myrkt tónaðar rútar aftan, tokulyktur framman og mangt annað.
Eykasett av felgum við píkadekkum fylgir eisini við. Til sølu fyri kr. 150.000,-
Áhugað kunnu ringja á 228148 ella 321448 eftir kl 18.


**Hyundai Sonata 2.0 bensin**



prísur **183.500,-**

Myrkagráur · árgang 2002 · km. 32.000
El-rútar · aircondition v.m.
Sera vælhildin

**Toyota Hiace 2.4 diesel**



prísur **58.000,-**

Hvítur · árgang 1993 · km. 208.000
Summardekk og píkadekk í góðum standi fylgja við

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tlf 31 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Sosialurin 341800


# Kvinnuskeið í sjálvsmenning
## við Anette Sundby

Undirtøkan til skeiðið í august í ár var so góð, at avgjørt er at halda nýtt skeið **8. og 9. november** í ár, báðar dagar kl. 09.00-16.30. Skeiðið verður hildið í Slættanesgøtu 5 í Havn, og pláss er fyri 16 luttakarum. Skeiðið kostar 1.850,00 kr.

Tilmelding á tlf. 227743 ella:
email@anettesundby.dk
Til ber eisini at fara inn á heimasíðuna:
www.anettesundby.dk

# Søkt verður eftir framleiðsluleiðara

*Havsbrún er eitt av stórstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá uml. 470 mill. kr árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl- og lýsi á Mjøldeildini, og alifóður á Fóðurdeildini. Størri helmingurin av framleiðsluni fer til útflutnings.*

Vit søkja eftir einum framleiðsluleiðara til Mjøldeildina, at byrja 1. januar 2004. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

**Arbeiðsuppgávur:**
Ábyrgd av framleiðsluni av fiskamjøli og lýsi, her undir ábyrgdina av:
- operatørum og framleiðslustarvsfólkum
- støðugt at optimera framleiðsluna
- at framleiðslutólini eru í góðum standi
- at góðskukrøvini verða hildin
- at menna framleiðslu og góðsku á lidnu vørunum

**Vit rokna við at tú hevur**
- góðan kunnleika til maskinur og teldur
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð leiðslu- og samstarvsevni

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 18. november 2003. Vil tú vita meiri, ert tú vælkomin at ringja til okkum ella senda teldupost.

HAVSBRÚN
**pf Havsbrún**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf 41 44 00
Fax 41 44 01
E-mail: phs@havsbrun.fo

Starvslýsing



- Álitandi
- Kreaktivur
- Søluágrýtin
- Royndur
- Søluágrýtin
- Sjálvstøðugur

Finnir tú hesar eginleikar á tínum C.V. og hevur tú hug at arbeiða í einum fjølbroyttum og mennandi umhvørvi, vóna vit at tú sendir eina skrivliga umsókn við ummælum, C.V og øðrum til okkum

Vit eru eitt væl etablerað handilsvirkið á Hálsi, ið bæði er heilsøla og smásøla, ið sóknast eftir einum nýggjum starvsfelaga. Arbeiði fevnir um alla vanliga handlisrøkt, umframt eru góðir møguleikar fyri víðari menning innan smásølu, heilsølu, innkeyp o.a.. Tann ið settur verður, má hava góð samstarvsevni og kemur at arbeiða í einum dynamiskum felagskapi.
Hevur tú spurningar til eitthvørt, vinarliga ring til Bjørg Dam á tlf. 266777.

**Thomas Dam á Hálsi**
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00


Sosialurin
www.sosialurin.fo


VESTMANNA KOMMUNA

Hervið verður søkt eftir starvsfólkum til barnaansingina hjá Vestmanna Kommunu at seta 1. desember 2003.

Starvsfólkini skulu ansa 40 børnum í vøggustovu- og barnagarðsaldri.

**Hesi starvsfólk skulu setast:**
1 pedagogur í 30 tímar/viku
1 pedagogur í 35 tímar/viku
4 pedogogar í 40 tímar/viku
2 hjálparfólkum í 40 tímar/viku

**Vit vænta:**
- at tit kunnu arbeiða sjálvstøðugt
- at tit eru fleksibul
- at tit eru opin og erlig
- at tit duga at síggja møguleikar fram um avmarkingar
- at tit hava góð samstarvsevnir

Møguleiki er fyri at gera avtalu um arbeiðstíðirnar.

Hjálparfólk verða sett, um pedagogar ikki søkja.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 10. november, kl. 12.00.

Søkt verður eisini eftir 1 vaskifólki í 11 tímar um vikuna. Vaskifólkið verður lønt sambært sáttmála ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag.

Skrivlig umsókn skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 10. november, kl. 12.00.

**Vestmanna Kommuna**

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Brúktir borivognar til sølu

Við hesum verða hesir borivognar lýstir til sølu:

1. stk. Atlas Copco Roc 410 árg. 1986
1. stk. Atlas Copco Roc 512 árg. 1987

Boðini uppá borivognarnar skulu verða í afturlatnum brævbjálva, og skulu vera Landsverkfrøðinginum í hendi í seinasta lagi 10. november 2003.

Landsverkfrøðingurin tekur sær rætt til at velja ímillum innkomnu boðini, ella einki at taka.

Nærri fæst at vita frá Jóan Petur Patursson, deildarleiðara, á tlf. 422420.

**LANDSVERKFRØÐINGURIN**